UTTAN ÚR HEIMI

## Alivinnan stórt avlop

2005 verður eitt gullár hjá norsku alivinnuni. Higartil í ár hevur vinnan havt 1,6 milliard krónur í avlopi, og talið kemur upp á tríggjar milliardir krónur, áðrenn árið er av, skrivar Dagsavisen.

Í krónum er hetta næstbesta úrslitið hjá norsku alivinnuni nakrantíð. Bara metárið 2000 royndist betur, men sagt verður, at nú er alivinnan betur før fyri at verja seg ímóti einum prísfalli sum tí í 2001, tá vinnan næstan steðgaði upp.

Teir fyrstu sjey mánaðarnar í ár hevur meðalprísurin á kruvdum laksi verið 24 krónur fyri kilo, og hetta verður væntandi eisini meðalprísurin alt árið. Heldur tann metingin, fara norðmenn at selja laks fyri 12,5 milliardir krónur í ár.

## Ómaksgjøld hækka nógv

Í Danmark hava mong fýlst á, at bankarnir hava størri og størri inntøkur av ómaksgjøldum, samstundis sum teir hava stórt avlop á roknskapinum. Bankarnir hava svarað, at ómaksgjøldini eru ikki hækkað, men at meirinntøkan kemst av, at fólk brúka bankarnar meiri enn fyrr.

Men hetta er ikki allur sannleikin, skrivar Berlingske Tidende. Blaðið hevur kannað ómaksgjøld hjá fleiri bankum, og niðurstøðan er, at fleiri bankar hava hækkað ómaksgjøldini, og at aðrir eru í ferð við at gera tað. Í summum førum eru gjøldini hækkað bæði 50 og 100 prosent. Summir taka uppaftur meiri rívan til. Eitt nú hevur Alm. Brand Bank júst kunngjørt, at hansara ómaksgjøld hækka 150 prosent.

Brúkaraumboðsmaður in Hagen Jørgensen sigur við Berlingske Tidende, at tað er ógjørligt hjá fólki at finna útav, hvussu tey kunnu spara í ómaksgjøldum, og í nøgvum førum ber ikki til at sleppa undan teimum. Sjálvur heldur hann, at bankarnir gera sær dælt av, at fólk gjalda rokningar og taka pengar út.

## Assad fer til New York

Tá toppfundur verður í ST í næsta mánað, verður tað fyrstu ferð, at ein sýriskur forseti tekur lut í einum slíkum fundi. Tað váttaði sýriski ST-sendiharrin í gjár.

Tí Hafez al-Assad hevur kunngjørt, at hann fer á fundin, sum verður í døgunum frá 14. til 16. september. Pápi hansara, Hafezm al-Assad, sum var sýriskur forseti í mong ár, var ongantíð á toppfundi hjá ST, men sonurin hevur fleiri ferðir sagt, at hann vil hava betri viðurskifti við USA, og eygleiðarar tulka avgerð hansara um at fara á fundin í næsta mánað sum eitt stig tann vegin.

Á fundinum í næsta mánað fara leiðarar úr meiri enn 170 londum at tosa um trygdarpolitikk, menningarmál og mannarættindi, og harafturat skulu teir umrøða ymsar hugsanir um at nýskipa heimsfelagsskapin.

## Jackson flytir til Bahrein

Nú ljóðar, at amerikanska poppstjørnan Michael Jackson umhugsar at flyta til arabiska landið Bahrein.

Herfyri varð Michael Jackson fríkendur fyri at hava misbrúkt børn og ung kynsliga, og síðani dómin hava nógvar gitingar verið um, at hann ætlar sær at flyta úr USA. Svenska blaðið Expressen visti í gjár at siga, at poppstjørnan hevur keypt eini meiri enn 500 fermetrar stór hús í oljulandinum Bahrein.

Sambært blaðnum hevur Michael Jackson verið í Bahrein og stytt sær stundir saman við prinsinum Hamad al-Kaliffa. Men tað ljóðar eisini, at Jackson umhugsar at taka við islamskari trúgv, og hann sigst hava serligan áhuga fyri tí víðgongda muslimska felagsskapinum Nation of Islam, skrivar Expressen.

Tríggir av nevningunum í rættarmálinum ímóti Michael Jackson vildu hava hann dømdan sekan. Teir eru nú í ferð við at skriva hvør sína bók um hann.

# Palestinar krevja eisini Vestara Áarbakka

**– Ísraelska fturtøkan úr Gazageiranum er eitt søguligt stig, men ikki nóg mikið, sigur palestinski forsetin**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

– Hetta er eitt týðandi søguligt stig, men tað átti eisini at umfata Vestara Áarbakka og alt øki, sum Ísrael hevur lagt undir seg samanborið við markið í 1949, sigur Mahmoud Abbas, forseti.

Hann vísir á, at palestinar vilja hava sítt egna ríki, sum skal umfata Gazageiran, Vestara Áarbaka og tann arabiska partin av Jerusalem, sum Ísrael hersetti í krígnum í 1967. Fleiri palestinar bera ótta fyri, at ísraelska afturtøkan úr Gazageiranum er ein politiskur leikur, sum hevur til endamáls at styrkja ísraelsku satøðuna á Vestara Áarbakka. Men tað kunnu vit ikki góðtaka, sigur Mahmoud Abbas.

Eygleiðarar vísa tó á, at atfinningarnar hjá forsetanum kunnu vera ein liður í valstríðnum upp undir palestinska tjóðartingsvalið, sum verður tann 21. januar.

Abbas er ikki serliga væl umtóktur ímillum teir víðgongdu palestinararnar, men hann hevur sagt, at hann er sinnaður at lata felagsskapir sum Hamas taka lut í friðarsamráðingunum við Ísrael, sjálvt um teir halda fast um, at teirra fremsta endamál er at beina fyri tí jødiska ríkinum.

# Sleppa ikki kravinum um eitt kurdiskt ríki



*Samráðingarnar um nýggja irakska grundlóg draga út. Her tosar formaðurin í grundlógarnevndini, Humam Hamoudi (vm.), við ein av leiðarunum hjá shiamuslimska meirilutanum*

*Mynd: Reuters*

**Hóast kurdarnir í Irak væntandi fara at skriva undir eina nýggja irakska grundlóg, merkir tað ikki, at kravið um egið ríki er slept**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Uppskotið til eina nýggja irakska grundlóg skuldi upprunaliga leggjast fyri tjóðartingið í Bagdad mánadagin, men nú er framløgufreistin longd eina viku. Tann almenna frágreiðingin er, at ein sandstormur, sum herjaði partar av Irak í síðstu viku, darvaði nevndini so nógv, at hon má fáa eina viku afturat til arbeiðið.

Men okkurt bendir á, at í hvussu er partar av nevndini meta uppskotið sum eina fyribilsloysn. Á vitjan í Noregi hevur varaforsætisráðharrin í tí kurdiska landspartinum sagt, at kurdarnir har norðuri í Irak fara ikki at slaka ein tumma í spurninginum um sjálvsstýri, og at málið er framvegis, at kurdarnir skulu hava sítt egna ríki.

– Okkara dreymur er at fáa egið ríki, og tað er eisini okkara rættur, segði Emad Ahmed, varaforsætisráðharri, við Dagsavisen í gjár. Hann greiddi frá, at seinastu dagarnar hava stórar kravgongur verið í tí kurdiska landspartinum til frama fyri sjálvsstýri.

Emad Ahmed sigur, at kurdarnir fara at góðtaka eina grundlóg fyri alt Irak, men treytin er, at kurdarnir varðveita sítt sjálvsstýri.

– Hetta er tann frægasta loysnin júst nú, og so má tað næsta ættarliðið berjast fyri egnum ríki, sigur hann.

Kurdarnir hava havt fleiri krøv undir samráðingunum um ta nýggju grundlógina. Teir vilja hava ræðið í oljubýnum Kirkuk, og teir krevja, at tað kurdiska málið skal viðurkennast sum alment má í Irakl á jøvnum fótu við arabiskt. Haraftur at krevja teir at hava egnan her, sum skal vera óheftur av irakska stjórnarherinum.

– Vit mugu varðveita herin. Viðurskiftini í Irak eru ikki trygg, og vit mugu verja markið fyri norðan, sigur kurdiski varaforsætisráðharrin við Dagsavisen.

Turkaland, sum hevur mark við tann kurdiska partin av Irak, skuldsetti í síðstu viku iraksku kurdarnar fyri at hava gjørt álop inn um turkiska markið. Tayiip Erdogan, forsætisráðharri, hótti tá við at senda turkiska herin inn um irakska markið, góvust kurdarnir ikki við ágangin.